


*- Eggjanin at virðisøkja tilfeingið verður nógv størri, tá rættindini verða avmarkað. Eftir okkara skipan fara tey reiðarí og skip, sum duga at fáa mest burtur úr í virði, eisini at fáa fígging og fara at kunna bjóða uppá fiskirættindi, segði Høgni Hoydal undir framløguni á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Øll veiðirættindi skulu savnast í eini tilfeingisbúð

**- Soleiðis, sum fiskiveiðiskipanin virkar, er hon hvørki lívfrøðiliga ella búskaparliga burðardygg. Skip og loyvir verða seld úr bygdum og økjum, sum harvið missa tey med alla. Eisini er ramaskrígg, hvørja ferð løgtingið skal áseta fiskidagar, tí hvørt loyvi og skip sær seg missa møguleikar. Verandi skipan er fastløst, og eingin dynamikkur er í henni, segði Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisins á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna mánamorgunin**

FRAMLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum vit lósu í blaðnum í gjár, høvdu Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, formaður og næstformaður Tjóðveldisins, framløgu fyri næmingum og lærarum á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna mánamorgunin. Tveir skúlatímar vóru settir av til tiltakið, og tað vóru næmingar, sum hava fiskivinnubreyt í 2.HIF og næmingar úr 1.HIF, sum saman við nøkrum lærarum á skúlanum lýddu á.

Evnið var "Fiskivinnupolitikkur – Tjóðveldi og tilfeingisbúð", har greitt var frá søguni aftanfyri føroyska fiskiveiði, studningsviðurskiftum, fiskidagaskipanini og uppskotinum hjá Tjóðveldinum um eina almenna tilfeingisbúð, har øll veiðirættindi skulu savnast og handlast.

## Grov spekulatión

Høgni Hoydal segði, at føroysk fiskiveiða er í eini bíðistøðu, tí ásetingin um, at loyvini verða latin í 10 ár í senn, gongur endaliga út um ársskiftið 2017/2018.

- Ymiskar hugsanir eru frammi um, hvussu framtíðin hjá høvuðsvinnu okkara skal skipast, serliga eftir 2018. Vit hava fyri fleiri árum síðan lagt fullfíggjað uppskot fyri tingið um, at øll veiðirættindi, sum Føroya fólk ræður yvir, skulu savnast og seljast á einum almennum fiskirættindamarknaði – ella í eini tilfeingisbúð, sum vit hava valt at rópa tað.

Hann segði, at soleiðis sum skipanin er í dag, er talan um grova spekulatión av fólksins ogn, og henda yvirkapitalisering, sum Føroyar hava verið vitni til, hevur ført til vánaligt rakstrargrundarlag.

- Soleiðis, sum skipanin virkar, er hon hvørki lívfrøðiliga ella búskaparliga burðardygg. Skip og loyvir verða seld úr bygdum og økjum, sum harvið missa tey med alla. Eisini er ramaskrígg, hvørja ferð løgtingið skal áseta fiskidagar, tí hvørt loyvi og skip sær seg missa møguleikar. Verandi skipan er fastløst, og eingin dynamikkur er í henni.

Undir síni framløgu nam Høgni eisini við støðuna hjá línuflotanum, sum er vaksin við, at fleiri smá loyvi eru løgd saman, ið síðan eru endað sum línuskip.

- Línuflotin er nú vorðin so dýrur, at vandi er fyri, at ein stórur partur av honum fer á húsagang, segði hann.

Uppskot Tjóðveldisins um tilfeingisbúð byggir á, at øll fiskiloyvi sum frá líður detta burtur.

- Síðan fer fiskiloyvi bert at snúgva seg um góðkenning av skipi til fiskiskap, har kravt verður, at skrásetingin er í lagi, eins og trygdar-og umhvørviskrøv eru fylgd.

## Øll veiðirættindi

Tjóðveldi sær fyri sær, at almenna tilfeingisbúðin sum frá líður situr á øllum veiðirættindum, sum føroyingar eiga, bæði í føroyskum sjógvi og í avtalum við aðrar tjóðir.

- Tilfeingisbúðin skal handla øll veiðirættindi á Føroyaleiðini eins og øll veiðirættindi, sum føroyingar hava samráðst seg fram til í tvílandaavtalum, strandalandaavtalum og annars søgulig rættindi, sum vit eiga á fjar-og miðleiðum.

Høgni segði, at sambært uppskotinum verða fiskidagar og kvotur boðin út regluliga og við stuttum millumbili í ymisku skipabólkunum.

- Vit kundu soleiðis hugsað okkum, at fiskidagar í heimaflotanum og pelagiska flotanum verða bodnir út 14. hvønn dag, meðan fiskidagar hjá eitt nú fjarfiskiflotanum verða bodnir út í vanligari túralongd.

Formaður Tjóðveldisins legði aftrat, at soleiðis, sum verandi fiskidagaskipan hevur virkað og hevur verið umsitin, eru skip seld við loyvum fyri vaksandi okursprísir, samstundis sum fiskidagarnir sjálvir lítið og einki eru umsettir.

- Vit hava nærum onga regulering ella stýring sæð gjøgnum fiskidagarnar, legði hann aftrat.

## Ávegis uppskot

Allar detaljur eru ikki við í uppskoti Tjóðveldisins um tilfeingisbúð, men í Vestmanna greiddi Høgni Hoydal frá, at tá fiskidagar verða bodnir út, og tilboð uppá dagar koma inn, verður hugt at, hvussu tilboðini liggja.

- Hugsandi er, at prísurin fyri fiskidagar kemur at byggja á møguleikar, ið hesir dagar hava, tá teir verða bodnir út. Eitt nú verður hugt at fiskaprísi, útreiðslum, ið standast av veiðini og øðrum viðurskiftum, ið hava týdning fyri veiði og úrtøku.

Hann segði, at fiskidagar, sum ikki verða keyptir, fella burtur.

Høgni Hoydal vísti í hesum viðfangi á ítøkiliga uppskotið, sum Tjóðveldi herfyri legði fyri tingið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

- Í hesum uppskoti verður dentur lagdur á, at latin fiskirættindi eftir verandi skipan skulu gagnnýtast, og at í minsta lagi 90% av tillutaðum fiskidøgum hjá ávísum skipi ella báti í einum fiskiári skulu brúkast.

Hann segði, at eftir uppskotinum er sama galdandi við tillutaðum kvotuparti, egnari árskvotu, egnum hjáveiðiparti og egnari hjáveiðikvotu.

- Um minni enn 90% av tillutaðu fiskirættindunum eru nýtt, verða rættindini komandi fiskiár skerd í prosentum við muninum millum nýtsluna hetta tíðarskeiðið og 90%. Í serstøkum føri kann landsstýrismaðurin gera undantak frá hesum.

Ónýttu fiskirættindini fella aftur til landið.

Eftir nevnda uppskoti fær landsstýrismaðurin heimild at gera eina skipan fyri fiskirættindamarknað – ella eina tilfeingisbúð – við ásetingum um fyriskipan, gjøgnumskygni, atgongd og sølu-og keypstreytir.

Høgni segði, at Tjóðveldi kundi hugsað sær, at 10% av fiskidøgunum verða drignir inn í tilfeingisbúðina um árið, soleiðis at øll fiskirættindi liggja hjá tí almenna í 2018.

## Stovnsrøktin

- Tá vit hava skipað eina tilfeingisbúð, og øll fiskirættindi liggja hjá hesari, kann løgtingið í staðin brúka sína orku til at skipa fiskiveiðina eftir lívfrøðiligum og burðardyggum metingum. Ein slík skipan merkir, at eingin kann leggja seg omaná rættindi og eiga tey. Vinningurin fer til samfelagið, sum eigur rættindini, og hetta er eisini í samsvari við lógina um vinnuligan fiskiskap, har tilfeingið í havinum er ogn Føroya fólks.

Høgni Hoydal segði, at uppgávan hjá vinnuni tá verður at skipa seg innan karmarnar, sum tað almenna ásetur.

- Fyrimunirnir við tilfeingisbúðini eru eyðsýndir við tað, at yvirkapitalisering og spekulatión detta burtur, og kappingin millum fólk, sum hava hug at royna seg í vinnuni, økist. Eingi pláss ella økir í landinum nýtast at vera fyri vanbýti, og øll politisk serrættindastýring fellir burtur. Heldur enn at oysa pening út til gomul skip, fer at bera til at brúka pening til endurnýggjan av vinnutólunum.

Formaður Tjóðveldisins helt, at eggjanin at virðisøkja tilfeingið verður nógv størri, tá rættindini verða avmarkað, og í hesum sambandi nevndi hann eitt nú svartkjaftin, ið saktans kann virðisøkjast meira, nú kvoturnar eru nógv skornar.

- Eftir hesi skipan fara tey reiðarí og skip, sum duga at fáa mest burtur úr í virði, eisini at fáa fígging og fara at kunna bjóða uppá fiskirættindi.

Ein annar fyrimunur við hesi skipan verður, at eingin kann leggja trýst á landsstýrismannin í fiskivinnumálum um eitt nú fiskidagar.

## Varðveita bólkar

Høgni Hoydal segði, at veiðibólkarnir í verandi fiskidagaskipan skulu varðveitast, eins og skott verður millum trol og húk í skipanini.

Men hvørjir verða so vansarnir við tilfeingisbúðini? spurdi formaður Tjóðveldisins.

- Ein spurningur, sum má loysast, er, hvussu forðast kann fyri kartellum í teimum bólkum, har fá skip og reiðarí eru, soleiðis at hesi ikki avtala síni boð. Ein annar trupulleikin er, um skip bara leggja seg eftir dýrastu fiskasløgunum til tess at fáa sum mest fyri hvønn fiskidag. Men hetta eru kortini somu trupulleikar, sum vit hava í dag, og hetta eru trupulleikar, sum kunnu loysast.

Høgni vísti eisini á trupulleikarnar, vit hava við svartkjaftabýtinum í løtuni, sum fleiri eru ónøgdir við.

- Eftir skipanini við tilfeingisbúð kundi kvotan eitt nú verið býtt sundur í 14 dagar í senn. Tey skip og reiðarí, ið fáa mest burtur úr í virði, megna eisini at bjóða og fáa fígging. Bjóðar ein ov nógv ella upp á ov nógvar dagar, vinnur viðkomandi einki, tí tá tíðarskeiðið er úti, detta rættindini burtur og verða boðin útaftur, segði Høgni Hoydal í síni framløgu á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.